## Ábøtur ganga sum ætlað

Landsverk sigur, at ábøturnar, ið arbeitt verður við í løtuni, ganga sum ætlað. Í Streymnesi verður arbeitt við at gera eina vinstrasnaringarbreyt og nýggjan busslumma. Hetta arbeiðið er um at verða liðugt. Alt eftir veðri verður sum skjótast farið undir at gera uppmerkingar, ið er tað seinasta, sum eftir er at gera. Í Hósvík verður arbeitt við at breiðka vegin við sjálva íbindingina. Eitt ferðslutrygdarátak, ið kann samanberast við tað, sum er gjørt við innkoyringina til Sandvíkarhjalla. Arbeiðið í Hósvík verður liðugt um hálvan februar. Eisini eru ábøtur gjørdar ið skulu økja um trygdina í Hvalbiartunlinum. Ein vinningur við hesum er, at fríhæddin á tunlinum nú er hækkað úr 3,20 metrum upp í 3,50 metrar. Norðari portalur í Hovstunlinum er ov stuttur, og hevur seinastu tíðina verið arbeitt við at leingja hann við 15 metrum. Hetta arbeiðið verður liðugt 1. apríl. Eftir at gera er at fuktbjálva portalin, fylla upp við mold og øðrum tilfari oman á honum, seta ljós upp og at skera av øðrum portalfótinum, sum er ov høgur. Í næstum verður farið undir at betra um trygdina í ávikavist Kunoyartunlinum og Leynatunlinum. Ferðsluábøturnar í teimum føroysku tunlunum verða gjørdar eftir einum tilmæli frá einum svenskum serfrøðingi frá stóru norðurlendsku ráðgevarafyritøkuni, Rambøll. Á Oyrareingjum verður eitt strekki upp á einar 100 metrar móti nýggju havnini á Signabø breiðkað í løtuni. Hetta arbeiðið skal eftir ætlan verða liðugt um ein mánað.



# apa balladuna í Bretlandi



*Kári P. Højgaard heldur, at tað serliga eru negativu tilráðingarnar hjá fiskifrøðiligu ráðgevingini, sum skapa balladuna í Bretlandi, sum hann tekur til*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, heldur upp á, at føroyska fiskiveiðan er burðardygg*

bretar skulu boykotta okkara fiskavørur og í hesum førinum serliga hýsuúrdráttir úr veiði undan Føroyum, samstundis sum fiskiveiðiskipanin í ES hevur spælt fallit.

Hann heldur, at okkara høvuðsboðskapur sum fiskivinnutjóð eigur at vera, at við okkara fiskiveiðiskipan kemur alt til sættis – og at veiðan, soleiðis sum vit skipa hana, hvílir á burðardyggum grundarlagi.

- Her er eingin útblaking av smáum fiski, ið vit so mangan hava sæð í øðrum fiskiveiðiskipanum, sum annars verða sagdar at vera burðardyggar.

Kári P. Højgaard vísir á, at stóru handilsketturnar í Bretlandi hava sínar egnu ráðgevarar, og í hesum føri er talan um felagsskapir, ið spesialisera seg innan hetta øki.

- Hetta hevur við sær, at tað helst verður torført frá politiskari síðu at fáa okkara fiskiveiði góðkenda sum burðardygga, tí politiskt verður tað trupult at ávirka hesar felagsskapir. Einasti møguleiki er tí helst, at tað verður vinnulívið, sum ger neyðuga upplýsingararbeiði til frama fyri okkara fiskavørur, sigur hann.

### Ballada í Bretlandi

Men hvar finna vit so ICES, Havstovuna og tær tilráðingar um fiskiveiði í øllum hesum, spurdu vit Kára P. Højgaard?

- Tað er eingin loyna, at høvuðstrupulleikin liggur í teimum tilráðingum, sum havgranskingarstovnurin ICES hevur viðvíkjandi veiði undir Føroyum. Tað eru hesar tilráðingar, sum skapa alla balladuna, sum løgtingsmaðurin tekur til.

Hann vísir á, at skuldu Føroyar fylgt tilráðingunum hjá ICES, hevði veiðan eftir ávísum fiskasløgum verið steðgað.

- Vit hava afturvendandi sæð slíkar tilráðingar síðan einaferð tíðliga í nítiárunum, men tíðin hevur víst, at tað hevði verið ein vanlukka fyri Føroyar, um hesar tilráðingar vórðu fylgdar.

### Flotin minkaður

- Eg fekk staðfest í svarinum hjá landsstýrismanninum, at okkara fiskiveiða hvílir á burðardyggum grundarlagi. Okkara fiskifloti er nógv minkaður seinastu árini, og nógv færri fólk eru bæði í fiskivinnuni á sjógvi og landi.

Kári P. Højgaard heldur eins og landsstýrimaðurin, at kanska er okkara línufloti vorðin nakað stórur, meðan fiskiskipaflotin annars er nógv minkaður.

- Eg haldi slett ikki, at sjálvt veiðitrýstið er største trupulleikin í okkara skipan, tí her liggja nógvir óbrúktir fiskidagar, eins og vit hava nógvar tekniskar forðingar, sum eru við til at verja okkara fiskastovnar.

Høvuðstrupulleikin er, heldur løgtingsmaðurin, at fleiri av teimum, sum í dag virka í vinnuni, noyðast at bera tungar byrðar, tí aðrir, sum eru farnir úr vinnuni, havt selt loyvir og dagar fyri okursprísir.

- Soleiðis hava vit eisini fingið ein óneyðuga skuldartyngdan fiskiflota, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður.